# Leggja dent á samstarv

*Landsstýrismaðurin við almanna- og heilsumálum hevur nú tikið avgerð um bygnaðin á Landssjúkahúsinum. Semja er gjørd millum læknar og sjúkrasystrar*

Eyðun Klakstein

Nú er avgerðin tikin um, hvussu bygnaðurin á Landssjúkrahúsinum skal verða.

Stríð hevur leingi verið um hetta, men nú eru partarnir vorðnir samdir um eina loysn, sum øll kunnu liva við.

Seinnapartin í gjár var tíðindafundur, har nýggi bygnaðurin varð lagdur fram.

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum skal myndast av einum sjúkrahúsleiðara, sum hevur endaligu ábyrgdina av Landssjúkrahúsinum. Afturat sær skal sjúkrahúsleiðarin hava ein læknastjóra og ein sjúkrarøktarstjóra.

Undir sjúkrahúsleiðsluni verður sjúkrahúsið innan kliniska økið býtt upp í tríggjar høvudsdeildir: Psykiatriska, medisinska og kirurgiska.

Hvør deild verður skipað við deildarleiðslu við einum leiðandi yvirlækna, sum hevur endaliga ábyrgd av deildini mótvegis sjúkrahúsleiðsluni, og einari yvirsjúkrasystir. Størvini vera áramálssett í 6 ár við møguleika fyri at leingja setanirnar. Á hvørjari deild verður settur ein leiðsluskrivari.

Leiðslubygnaðurin á undirdeildunum, tað er seingjadeildir, verður órbroyttir við einum deildarleiðara, sum refererar til deildarleiðsluna.

### Samstarvsandin í hásæti

Leiðslurnar á teimum trimum høvuðsdeildunum hava ábyrgd av, at avtalaðar uppgávur verða loystar innanfyri teir fíggjarkarmar og ásetingar, sum eru galdandi fyri deildina. Raðfestingin skal avtalast millum sjúkrahúsleiðsluna og deildarleiðsluna.

Tað verður leiðandi yvirlæknin, sum hevur endaliga rakstrarligu, fíggjarligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av deildini.

Deildarleiðslan skal leggja til rættis, samskipa og leiða virksemið á deildini og syrgja fyri, at tænastan verður munagóð. Ætlanin er, at deildarleiðslan skal avtala dagliga arbeiðsbýti sínamillum.

Landsstýrismaðurin leggur dent á, at uppgávur skulu loysast í einum samstarvsanda í deildarleiðsluni. Leiðslan skal hava ein opnan leiðslustíl, og harvið tryggja starvsfólkunum góða kunning um øll viðurskifti á deildini. Stinga ivamál seg um, skulu tey loysast í samstarvi og við semju.

Um tað skuldi hent, at semja ikki fæst um eitt mál, er tað avgerðin hjá leiðandi yvirlæknanum, sum er galdandi. Tó undantikið, tá tað snýr seg sum sjúkrarøktarfakligar spurningar, tít á er tað yvirsjúkrasysturin, sum kann taka avgerð.



*Jóan Petur Davidsen, formaður í formaður hjá læknunum, Helen Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í almanna- og heilsumálum og Joan Ziskason geva hvør øðrum hondina uppá, at tey skula samstarva í framtíðini*

**Mynd: Jonhard Hammer**

Stingur ósemja seg upp um prinsippiellar spurningar, skal deildarleiðsan haa møguleika at leggja hesi mál fyri sjúkrahúsleiðsluna til viðgerðar, áðrenn endalig avgerð verður tikin.

Tað verður deildarleiðslan, sum verður setanarmyndugleiki hjá øllum starvsfólkunum á deildini.

### Skipa fyri sínum øki

Tað verður lagt upp til, at leiðandi yvirlæknin serliga skal standa fyri menningini á læknafakliga økinum, og hann skal hava ábyrgd av, at skipað verður fyri undirvísing, útbúgving og menning innan øki.

Sergreinarnar verða undir leiðslu av yvirlæknanum við serlæknaheiti. Hesir hava endaligu ábyrgdina av viðurskiftum innan teirra fakliga øki. Teir skulu tó taka altit til millum annað fíggjarligar karmar og aðrar ásetingar, sum eru fyri øki.

Yvirsjúkrasysturin skal serliga standa fyri menningini innan sjúkrafakliga økið, og hon skal hava ábyrgd av, at skipað verður fyri undirvísing, útbúgving og menning á økinum. Hetta skal tryggja, at røktarfakliga støðið altíð er nøktandi.

Á tíðindafundinum í gjár fegnaðist Helena Dam á Neystabø um, at loysn nú er funnin á málinum um bygnaðin.

Hon helt, at nýggi bygnaðurin verður tann endaligi fyri Landssjúkrahúsið.

# Creamy á pall í Havn



*Eykakonsert verður við poppbólkinum Creamy í høllini á Hálsi*

Nú er greitt, at poppduoin Creamy, sum føroyska Rannvá Joensen mannar saman við donsku Rebekku Mathew, fer á pallin í Havn eisini.

Konsertin, sum verður í Runavík sunnudagin 20. februar, var útseld eftir fáum døgum, og síðani tá hevur verið tosað um at hava eina eykakonsert í Havn.

Samráðingar hava verið millum fyrireikararnar og umboðsfólk hjá Creamy, og nú er avtalan komin undir land. Sostatt fer bólkurin, sum syngur kendar danska barnasangir, á pallin í ítróttarhøllini á Hálsi leygardagin 19. februar kl. 17.00

Tað er hondbóltsfelagið Kyndil, sum skipar fyri hesi konsert, meðan Kappróðrarfelagð NSÍ skipar fyri konsertini í Runavík.

MIllum 1800 og 1900 fólk hava keypt atgongumerki til konsertina í Runavík, og pláss er fyri eins nógvum fólkum í høllini á Hálsi.

Atgongumerkini til hesa eykakonsertina vórðu sett til sølu í gjárkvøldið, og tey fáast á flestu Statoil-støðum í landinum umframt á Kunningarstovuni í Havn.

Saman við Creamy fara Kular Røtur úr Klaksvík at spæla. Ein fløga og eitt sjónband komu við Kulu Røtunum fyri jól, og hesi hava selt væl. Sangir sum Bilurin hjá okkum og Brúsi hava verið nógv spældir síðani.

ek



# Jørgin Dahl aftur á pall í Føroyum



*Arbeitt verður nú við at skipa fyri konsert í Føroyum, har Jørgin Dahl skal spæla saman við nýggjum bólki*

Eyðun Klakstein

Í gjár kom fyrsta solofløgan hjá Jørgini Dahl út, og í kjalarvørrinum á hesum verður nú arbeitt við at fáa tiltikna komponistin og tónleikaran aftur á pall í Føroyum.

Men fólk verða noydd at brynja seg við toli, tí tað verður ikki fyrstu nógvu vikurnar, at klaksvíkingurin aftur fer at spæla á konsert í Føroyum.

Í løtuni verður arbeitt við at skipa fyri konsert í summar, og møguliga verður tað á Jazzfestivalinum í ár, at Jørgin Dahl aftur verður at síggja. Tað eru yvir 10 ár síðani, at Jørgin stóð á pallinum á tiltiknu 70'ara konsertini í KÍ-høllini í Klaksvík.

– Eg hevði gjarna viljað sloppið at spælt sangirnar á nýggju fløguni hjá mær fyri føroyingum, sigur Jørgin Dahl, sum hóskvøldið kom til landið í sambandi við útgávuna av *Lost Pilgrims*.

Nýggja fløgan er komin til landið, men tað er ein framleiðslufeilur í tveimum av sangunum, og tí má nýggj sending fáast til landið í næstu viku.

Fólk, sum hava hug at ogna sær fløguna beinanvegin, kunnu gera tað, og tey fáa høvi at býta fløguna um, tá nýggja sendingin kemur til landið um eina viku.

Í 2'aranum í dag hava vit eitt portrett av Jørgini Dahl.

# Ongir pengar til kanningar

Ætlaða kanningin av skjalasøvnum eystarfyri er útsett óásetta tíð.

Hetta segði løgmaður løgtinginum, tá hann legði sína frágreiðing um uttanlandsmál fyri tingið.

Anfinn Kallsberg førdi annars í fjør fram, at í ár skuldi farast undir at kanna skjalagoymslur eystanfyri, eftir at líknandi kanningar vóru gjørdar í vesturheiminum.

Við at finna skjøl eystanfyri ætlaði løgmaður at fáa javnvág í viðgerðina av hermálsliga og trygdarpolitiska týdninginum, sum Føroyar høvdu undir kalda kríngum.

Men Løgmansskrivstovan hevur ikki pengarnar, sum tað kostar at gera kanningar eystanfyri, og tí hevur løgmaður útsett kanningarnar. Nær tær verða gjørdar, er enn ógreitt.

Kanningarnar, sum søgufrøðingar gjørdu í Føroyum, Danmark, Onglandi og USA, eru grundarlag undir Svørtubók, sum kom út í fjørheyst.

**ek**

## Hægri fiskivinnuútbúgving í Íslandi

*Enn hava vit í Føroyum bert fiskivinnuútbúgving á miðnámsstøði*

Í februar í ár kemur ein flokkur, sum lesur fiskivinnu á Universitetinum á Akureyri, til Føroyar at kunna seg um føroyska fiskivinnu, og føroysk viðurskifti annars. Íslendingar hava í 10 ár bjóða áhugaðum at taka hægri útbúgving innan fiskivinnu og higartil hevur Universitetið á Akureyri útbúgvið 56 kandidatar við hægri fiskivinnuútbúgving. Enn hava vit í Føroyum bert fiskivinnuútbúgving á miðnámsstøði.

Í 1972 byrjaði Universitetið í Tromsø við eini hægri útbúgving innan fiskivinnu. Íslendska útbúgvingin á Universitetinum á Akureyri er gjørd við norsku útbúgvingini sum fyrimynd. Íslendska útbúgvingin er normerað til 4 ár. Eftir lokið prógv fáa tey lesandi eina Bachelor of Science grad í fiskivinnu.

So skjótt tey eru liðug við útbúgvingina fáa tey lesandi starv í privatu vinnuni í Íslandi og í útlondum. Tey arbeiða m.a. hjá reiðaríum, fiskavirkjum, bankum, sølu- og marknaðarfyritøkum.

Sjálvt um øll, sum hava tikið útbúgvingina, fáa gott starv eftir lokna útbúgving, vísir tað seg at vera trupult hjá Universitetinum at fáa nóg nógv lesandi á hvørjum ári. Tað eru millum 10 og 15 lesandi, sum byrja at lesa fiskivinnu á hvørjum ári, talið skuldi helst verið 20 til 25 lesandi. Kappingin um studentar er hørð við aðrar útbúgvingar, sum t.d. jura og verkfrøði. Møguliga er orðsøkin til støðuna hjá fiskivinnuútbúgvingini, at íslendskur ungdómur hevur fordómar ímóti at arbeiða í fiskivinnuni, sjálvt um vinnan í dag er framkomin

## Legur í Zarepta

Sum kunngjørt aðrastaðni í blaðnum í dag, er ætlanin aftur í ár at hava legur í Zarepta. Hetta er 34. árið á rað, og verður lýst við drúgvari skrá, sum byrjar longu í mai mánaði.

Upprunaliga var byrjað við barna- ungdómslegum í summarfrítíðini, men sum frá er liðið, eru aðrar legur og stevnur komnar afturat – og heldur virksemið í dag fram uttan slit til heystfrítíðina.

Sum helst tey flestu vita, liggur Zarepta í Vatnsoyrum. Har er framúr náttúruvakurt og friðarligt. Burtur frá alfaravegi, við ánni og haganum sum nærumhvørvi, er staðið sera væl egnað til leguvirksemi.

Síðan stovnanina í 1967 eru eisini við jøvnum millumbili útbyggingar og ábøtur gjørdar og eru umstøðurnar í dag sera góðar bæði innandur aog uttandura.

Har er innandura svimjihylur, graslíkisvøllur, kanohylur og góðar umstøður til spæl uttandura. Alt hetta ger dagarnar ríkari fyri børnin og tey ungu.

Viðvíkjandi ábótum kann nevnast, at í løtuni verður allur køkurin gjørdur av nýggjum.

Legurnar, sum í hesum døgum verða kunngjøardar, eru: Sjey barna- og ungdómslegur og fimm familjulegur, sum byrja leygardag og enda fríggjadag. – Eisini verður eitt bíbliuskeið, ið varir eina viku og er ætlað øllum aldursbólkum

Síðan verða hesar vikuskiftislegur: Lega fyri brekað, lega fyri einlig, lega fyri tey, ið eru 18 ár og eldri, tvær hjúnalegur, kvinnustevna og mansstevna. – Til seinast verður ein ungdómslega í heystfrítíðini.

Umframt hesar legur er ymiskt annað virksemi í húsinum gjøgnum árið. – Styttri bíbliuskeið hava verið við jøvnum millumbili – og hesi seinnu árini ehvur verið rættiliga vanligt, at einstakar samkomur eru farnar á legu í Zarepta eitt vikuskifti.

Høvuðsleiðari í Zarepta í ár er John í Skemmuni.

Høvuðsendamálið við virkseminum í Zarepta, er at geva fólki okkar aorð Guds, so at tey kunnu koma til persónliga trúgv á Kristus – og eisini at læra tey frá orði Guds, soleiðis at tey gerast betur før fyri at liva hitt kristna lívið.

Allar legurnar hava eina skrá við bíbliutímum, andaktum, møtum og øðrum virksemi, ið er náttúrligt fyri teir ymisku aldursbólkarnar.


Vakurleikaserfrøðingur frá

CLINIQUE

vitjar nú aftur

hesaferð í viku 7 (14.-20. feb.)

Hvussu fært tú longri og meiri fyllu í eygnuvippurnar og hvussu varðveitur tú tær meira livandi?
Bert CLINIQUE kann framleiða eina mascara, sum gongur øllum hesum 3 krøvum á møti.
Tað hevur CLINIQUE gjørt við tí heilt nýggju Longstemmed Lashes Mascara, 100% óparfumerað.




Støkkið inn á gólvið ella ringið 314811 og bíleggið eina ÓKEYPIS tíð til ráðgeving og at leggja make-up

parfumarí Drós

Áarvegur 6 • Tel. 314811 • Fax 318956 • E-mail: dros@post.olivant.fo

Sosialurin - 311820